TILTØK

Spælistovan í Meiningheitshúsinum
er opin frá kl. 9.00-12.00 mánadag, mikudag og hósdag fyri foreldrum við børnum uttan ansing.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-friggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 9. des.:
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Gera jólapryði og dekoratiónir
kl. 14-18 Kortspæl, telving, bobbspæl, dart og onnur spøl.
Týsdagin 10. des.:
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, jólasangløtan. Kakao og bollar (tilhaldskokkarnir)
kl. 15 »Misskiltar føroyskar/danskar skemtisøgur«
Mikudagin 11. des.:
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Suomi – Finland, Hanna Niinimaa
Hósdagin 12. des.:
kl. 10-10.30 Jólafimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
Fríggjadagin 13. des.:
kl. 10-15 Opið hús
kl. 14 Stásið vísir stás

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Losjan í Havn Tinghúsvegur 18
Sunnudagin 8. des. kl. 17.00 verður jólahugni.

Eysturoyar Gongufelag
Í sambandi við gongutúrin undir Vestmannasund, skipa Kunningarstovurnar í Eysturoynni fyri bussi aftur og fram. Bussurin fer frá Kunningarstovuni í Saltangará kl. 12.30 og steðgar á Skipaneskrossinum, í Skálabotni og á Oyrabakka. Neyðugt er tó við tilmelding á tlf. 444860/225224 (Fuglafirði) ella 449449/211449 (Saltangará). Kostnaður 50 kr.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við afturvenjing.
Sendið okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, BellaVista, Bellevuevej 7, 2. tv., 2930 Klampenborg, Danmark.
Tú kanst eisini ringja til: tlf. +45 39902665 (Jón) mobil: +45 24430903 (Jón)
www.neozone.dk

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy/Vágur
AA-fundur verður í Vágs skúla hvønn leygardag kl. 19.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerð/farfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið mánadag og mikudag millum kl. 12 og 16 og týsdag kl. 16-18. LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LISA
Skrivstovan Listafólkasamband Føroya í Pætursarstovu, er opin allar gerandisdagar frá kl. 9-12. Limir eru vælkomnir inn á gólvið.
tlf: 320197
teldupostur:lisa@lisa
heimasíða: www.lisa.fo

Amnesty International, Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Tlf. 315816
Skrivstovan er opin mánadag frá kl. 13.00-17.00 og mikudag frá kl. 9.30-17.30.
Heimasíðan: www.amnesty.fo
Teldupost: Amnesty-Amnesty.fo

MÁF
(Meginfelag Áhugaleikara Føroya) heldur til í húsum Hans Andrias Djurhuusar undir Pisuvarða 2, Tórshavn Tlf. 315624, Faks 315924, e-mail: maf@maf.fo
Heimasíða: www.maf.fo
Opið er: má. og tý. kl. 10-15, mi. kl. 13-18, hó. og fr. kl. 10-15.
Endamál felagsins er at stuðla áhugaleiklist og menna hesa mentunargrein í Føroyum. 16 sjónleikarafeløg eru limir í MÁF.
Formaður: Hilmar Joensen, Nólsoy. Dagl. leiðari: Malan Matras Joensen.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldrumboð: Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Tórhild, e-mail: torhildm@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897, e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir. Tlf./fax 312098 · Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Íslandsvegur 10C, FO-100 Tórshavn.
Tlf. 317373. Fartlf. 264839.
Faks: 310813.
t-postur: mbf@post.olivant.fo
Heimasíða: www.mbf.fo

Alzheimerfelagið
Tórsbyrgi 16
100 Tórshavn
Heimasíða: www.alzheimer.fo
t-postur: sigmo@post.olivant.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið á tlf. 313102.
Demenslinjan er telefonráðgeving í øllum viðvíkjandi demens. Tlf. 313102 svarar týsdag kl. 18–20.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
Tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 7. des.: Runavík tlf. 44 80 16
Sunnudagin 8. des.: Runavík tlf. 44 80 16

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

BRÚDLEYP

Í dag, 7. desember kl. 15.30 giftast í Sjóvar kirkju Atli D. Nattestad, Miðvágur og Sóley í Selvindi, Strendur. Veitsla verður fyri innbodnum í Leguhúsinum í Nesvík.

14. desember kl. 16.00 giftast í Gøtu kirkju Noomi Sigurðsdóttir Sørensen, Norðragøta og Petur Reinert, Leirvík. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið, kunnu tekna seg á tlf. 441363 ella 443215 í seinasta lagi 8. desember 2002.

21. desember kl. 16.00 giftast í Fuglafjarðar kirkju Mimi Steintórsdóttir og Jan Otto Straagaard Holm, bæði úr Fuglafirði.

SILVURBRÚDLEYP

Sunnudagin 22. desember hava Elenita og Johannes Hansen í Kollafirði verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Kollafirði leygardagin 4. januar kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 421309 í seinasta lagi 18. desember.

Týsdagin 31. desember hava Marita og Andras E. Olsen í Norðragøtu verið gift í 25 ár. Dagurin verður hildin leygardagin tann 4. jan. í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.30. Tey, ið vilja gleða silvurbrúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at tekna seg á tlf. 441671 ella 441042, innan 20. des.

Týsdagin 31. desember hava Jógvan Elias og Edith á Løgmansbø verið gift í 25 ár. Silvurbrúdleypsdagurin verður hildin 28. desember kl. 19.00 í Pálsstovu í Tórshavn. Tey, ið ynskja at gleðast saman við silvurbrúðarparinum, verða vinarliga biðin um at siga frá í seinasta lagi 15. des. á tlf. 317686 ella 217686.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Báðir prædikutekstirnir til í morgin, 2. sunnudag í advent, snúgva seg um dómadag. Vit hoyra um, at ein dag kemur Jesus aftur. Tað vita vit øll. Sunnudag eftir sunnudag standa vit uppi í kirkjum okkara og játta okkara trúgv, har eitt av liðunum er: Hann skal koma aftur at døma livandi og deyð. Tað er ein partur av okkara kristnu trúgv, at hesin heimur skal ikki standa allar ævir, men skal ganga undir. Pætur ápostul skrivar, at Harrans dagur skal koma eins og tjóvur, og tá skulu himnarnir ganga undir við miklum duni og eldur skal koma í frumevnini, og tey skulu skiljast sundur, og jørðin og øll tey verk, sum á henni eru, skulu brenna upp.

Einaferð varð flent hart at hesum boðskapi. Tí tað kundi eins og hvør skilja, at h etta als ikki læt seg gera, at jørðin kundi ganga undir. Tað var fullkomuliga óhugsandi, at øll jørðin skuldi brenna og fara til grunda, soleiðis sum vit hoyra um tað í Halgubók.

Í dag er tað eingin longur, sum flennur at hesum. Enn ikki størstu gudloysingar ella mætastu vísmenn. Í dag vita vit bara alt ov væl, at hetta avgjørt liggur innanfyri møguleikans mark, ja, at tað ikki er neyðugt at trýsta á so nógvar knøttar, og alt stendur í einum loga. Men Jesus sigur, at tá ið alt hetta hendir, annaðhvørt tað so hendir á hendan ella hendan hátt, so er tað ikki tilvildarligt, so er ikki talan um eitt menniskjaligt brek, nei, tá ið hesin heimur gongur undir, er tað tí, at Gud sjálvur hevur avgjørt, at soleiðis skal tað ganga. Hann hevur sjálvur ásett ein dag, sum ikki verður broyttur – hvørki útsettur ella framskundaður. Tað kemur ein dagur tá ið nakað fer at henda, sum er tað størsta og ófatuligasta, ið hugsast kann, nakað, sum ikki verður boða frá í Degi og viku, í útvarpstíðindum ella við yvirskriftum í bløðunum, tí stundir verða ikki at siga frá tí, ella skriva um tað. Tá kemur Jesus á skýggjum himnalsins at døma livandi og deyð.

Men tann dag lyftir hitt kristana kirkjulíðið við gleði og væntan høvur móti himli, og bjóðar sínum frelsara og loysnara vælkomnum. Fyri teimum er tað ikki dómadagur, men frelsudagur. Tí ljóðar seinasta rópið í Halgubók: Eg komið skjótt. Amen, kom, Harri Jesus! Amen.

John S. Myllhamar

Leikhúsjól í Sjónleikarhúsinum

SJÓNLEIKUR
Tíðindaskriv

Komandi sunnudag kl 18 verður frumframførslan av Leikhúsjólum í Sjónleikarhúsinum í Havn. Leikhúsjól er afturvendani tiltak, sum Havnar Sjónleikarfelag skipar fyri í hvørjum ári í jólamánaðinum. Tiltakið vendir sær serliga til børn, men ung og vaksin kunnu eisini vænta sær eina sera hugnaliga løtu í Sjónleikarhúsinum.

Í ár verður tiltakið skipað í tveimum pørtum. Sjónleikaraskúlin hjá Havnar Sjónleikarfelagi og Tórshavnar Kvøld- og Ungdómsskúla við Hedvig Westerlund sum lærara, skipa fyri einum parti, meðan onnur úr Havnar Sjónleikarfelag skipa fyri hinum partinum.

Tiltakið varar í umleið ein tíma og spælt verður fram til 18. desember.

Atgongumerkir á 50 kr. fáast í Kunningarstovuni í Havn, sigur Havnar Sjónleikarafelag.

Tommy Petersen er formaður í Ráðnum fyri brekað

RÁÐIÐ FYRI BREKAÐ
Tíðindaskriv

Tommy Petersen, fyrrverandi almannastjóri, verður nýggjur formaður í Ráðnum fyri brekað. Hetta varð samtykt á ráðsfundi í seinastu viku. Limirnir í Ráðnum fyri brekað vóru á einum máli um at mæla landsstýrismanninum í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, til at velja Tommy Petersen til formann.

Ráðið fyri brekað metti, at Tommy Petersen hevur gott innlit í almannaøkið sum heild, eisini holla vitan um spurningar, sum viðvíkja brekaðum. Hesa vitan hevur hann frá einum longum arbeiðslívi innan almannamál.

Tommy Petersen er føddur í 1949. Hann er útbúgvin sosialráðgevi og cand.jur. Hann hevur verið leiðari á Andveikraeildini, stjóri á Almannastovuni, og var eitt skifti leiðari á Kærustovninum. Frá 1999 til 2002 hevur hann starvast sum ráðgevi í spurningum viðvíkjandi miðspjaðing í Nepal. Arbeiðsgevari var Danida. Tommy Petersen hevur síðani august 2002 verið ráðgevi í Oljumálaráðnum.

Tommy Petersen fegnast um tað álit, honum er víst við hesum sessi. Hann átekur sær hesa uppgávu við stórum áhuga og gleðir seg til at fara til verka saman við hinum ráðslimunum.

Hann kemur sostatt at ganga á odda fyri Ráðnum fyri brekað, sum sambært reglugerð m.a. hevur til uppgávu at geva landsstýrinum ráð í øllum almennum málum av týdningi fyri viðurskiftini hjá brekaðum í Føroyum, og at geva almennum myndugleikum ráð í málum, sum nema við livikor teirra brekaðu. Hetta skal gerast fyri at tryggja, at tað verður víst umhugsni til brekað í allari samfelagsráðlegging. Ráðið kann eisini av sínum eintingum seta fram uppskot um tiltøk ella broytingar innan øki, ið viðvíkja brekaðum.

Tey, ið manna Ráðið fyri brekað, eru Marjun S. Olsen, kommunustýrislimur í Vestmanna fyri Føroya Kommunufelag, Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri í Klaksvík fyri Kommunusamskipan Føroya, Leila Solmunde, formaður í Giktafelagnum fyri MBF, og Marjun Sigurðsdóttir, ið sum formaður í MBF er føddur limur í ráðnum. Harumframt situr Barbara á Tjaldrafløtti í ráðnum sum umboð fyri Løgmansskrivstovuna, og Kristjan Arnason sum umboð fyri Trivnaðarmálaráðið. Hesir seks limirnir hava gjørt tilmæli til landsstýrismannin um val av formanni, og hetta valið fall á Tommy Petersen.

Ráðið fyri brekað hevur sín næsta fund 19. desember 2002.